Henning Holten um langtíðaríløguætlanina

Fer neyvan at skapa betri vinnugrundarlag



Herfyri legði Jógvan Sundstein, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fram uppkot um langtíðaríløguætlan hjá tí almenna; uppskotið var ætlað sum eitt útkast til orðaskifti.

Henning Holten, búskaparfrøðingur, ivast stórliga í, hvussu fremjandi íløguætlanini er fyri vinnugrundarlagið í Føroyum.

Ov nógv til samskifti

- Íløgurnar í vegir, berghol, havnir og lendingar eru eftir mínum tykki alt ov umfatandi í mun til tann tørvin, sum vinnulívið hevur á hesum øki, sigur Henning Holten.

Eftir íløguuppskotinum úr Tinganesi fer reiðilig milliard í samskiftisútbygging næstu fimm árini, og tað eru tveir triðingar av ætlaðu almennu íløgunum. Harumframt fær Landsverkfrøðingurin árliga umleið 70 miliónir krónur at reka og umvæla veganetið fyri.

Búskaparfrøðingurin sigur, at sjálvandi skulu arbeiði, sum er í gerð áhesum øki, gerast liðug, og treyðugt so, at ikki onkrar ábøtur eru at gera innan samskifti.

Samskiftið væl útbygt

- Men Føroyar hava í dag stórt eitt væl útbygt vegasamband og góðar vinnumøguleikar, sigur Henning Holten,ið vísir á, at tað, sum ræður um, er at menna hesar møguleikar.

- Tí er tann stóri spurningurin, um ein framhaldandi tænir bygdunum við at gera íløgur í vegir, havnir o.l., sigur Henning Holten.

Nógv meira umráðandi er tað, heldur hann, at gera íløgur í undirvísing, granskning og útbygging av fiskiídnaðinum.

- Nógv smærri almennar íløgur høvdu havt munandi fleiri arbeiðspláss við sær, sum frá leið, tí tað høvdu verið óbeinleiðis íløgur í útflutningsvinnuna, sigur Henning Holten.

Alt ger mun

- Smáar almennar íløgur á Fróðskaparsetrinum, fiskivinnuskúlanum og handilsskúlanum kundu fingið alstóran týdning fyri menningina av fiskiídnaðinum, ið tørv á útbúnum fólki innan búskap, leiðslu og marknaðarføring, ið er ein týðandi liður, skal størri dentur leggjast á framleiðslu og útflutning av meirgóðskaðum fiskavørum.

Henning Holten nevnir í hesum viðfangið, at tørvur eisini er á einum tøknfrøðiligum stovni innan matvøru, sum kann geva fiskiídnaðinum nýggjar møguleikar.

- Vitan finst í landinum, men hon er á ymiskum stovnum og virkjum, sum ikki einsamallir kunnu virka til frama fyri vinnuna sum heild, sigur Henning Holten.

Forsvara seg ov nógv

- Í løtuni berjast fleiri almennir stovnar við hond og fót fyri at sleppa undan eini lægri játtan á fíggjarlógini. Í staðin áttu teir heldur at gjørt meira burturúr, hvat gagn teir kundu gjørt til frama fyri vinnulívsmenningina, fingu teir bara eina játtan, ið var bara munin størri enn tann núverandi, sigru Henning Holten.

Hann heldur, at ein partur av teimum ætlaðu almennu íløgunum kundu verðið brúktar at stuðla umbygging av verandi flakavirkjum, so tey kunnu framleiða aðrar vørur enn nú.

Góðskan størri týdning

- Íløgur í betri framleiðsluumstøður og í útbúgving fer at fáa størri og størri týdning framyvir, tí krøvini til góðskuna á vørunum fær alt størri og størri týdning, sigur Henning Holten,ið heldur tað er neyðugt við einum orðaskifti um almennar íløgur, m.a. eini støðutakan til, um uppskotið hjá Sundstein tænir vinnugrundarlagnum á bygd og harvið eisini í Føroyum sum frægast.

ówh

Almennir fyrilestrar

Fróðarorð um ymiskt

Føroya Fróðskaparfelag hevur sent út skránna fyri almennu fyrlestrarnar hesa heysthálvuna. Fyrilestrarnir, ið verða fimm í tali, verða allir mikukvøld klokkan. »Stundisliga«, sum tikið verður til. Fyrilestrarnir verða hildnir á Fiskirannsóknarstovuni í Nóatúni.

Fyrilestrarnir vera hesir.

9. oktober

Føroyar dálkaðar av geislavirkni?

Lýsing av geislavirknari dálking í Føroyum frá kjarnorkuspreingingum og frá Tjernobyl-vanlukkuni (Hans Pauli Joensen)

23. oktober

Hvussu reint er føroyska umhvørvið?

Lýsing av umhvørviskanningum í Føroyum í samanburði við onnur lond (Jákup Pauli Joensen)

6. november

Telduskráir um heilsuviðurskifti

Skrásetingarspurningar í sambandi við læknaligar kanningar (Pál Weihe)

20. november

Føroyar-Danmark


Støða Føroya í danska ríkinum við serligum atliti at politisku broytingunum í sambandi við, at demokratiska skipanin varð sett á stovn um miðju 19. øld (Jákup Thorsteinsson)

27. november

Hevur samfelagið brúk fyri vísindum?

Hvat granskning og hægri útbúgving hava at týða fyri eitt fólk til tess at varðveita mentan og samleika (Steen Busck)

Fróðskaparfelagið sigur í skránni, at lýst verður í fjølmiðlunum so hvørt.



Fyrsti fyrilesturin á Setrinum verður um geislavirkna dálking í Føroyum, sum stavar frá kjarnorkuspreingingum og Tjernobyl-vanlukkuni. Myndugleikarnir hava dult, hvussu umfatandi geislavirknið frá Tjernobyl-vanlukkuni er; granskingin og viðgerðin er farin fram á afturlatnum og loyniligum deildum. Men nú vera mótmælini alt meira opinskáað fyri at fáa dulda sannleikanum fram í ljósið.

Landsstyrets Íløguætlan 1991-1996

